# Syngjandi stjørnuparið strálaði

**Saman við Siloakórinum fekk heitasta parið í Føroyum, Eivør og Pætur, eitt fullsett Mentanarhús at gloyma alt um bítandi kulda og kava í samfullar tveir tímar**

KONSERT

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Atgongumerkini vórðu skrødd vekk eftir stuttari tíð, tá lýst varð, at Siloakórið, Pætur og Eivør, skuldu hava konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði sunnukvøldið. So nógv vóru ov sein á sjóvarfallinum, at fyrireikararnir gjørdu av at skipa fyri eini eykakonsert mánakvøldið.

Og tað var ikki uttan orsøk, at slíkur gravgangur var eftir atgongumerkjunum. Í samfullar tveir tímar var borðreitt við tónleiki í hægsta flokki.

Siloakórið undir leiðslu av Eyðuni á Lakjuni legði fyri. Lagt var út við nøkrum stillum sangum, men ímóti endanum av framførsluni hjá kórinum kom veruligt lív í við nøkrum gospel-kendum løgum. Kórið kom ómetaliga væl frá byrjunarskotinum, og var áhoyrarafjøldin nú væl hitað upp til hæddarpunktið.



*Hendan myndin varð tikin, tá Eivør og Pætur luttóku á jólakonsertini í Christianskirkjuni í Klaksvík. Sunnukvøldið bergtóku tey enn einferð - hesuferð í Mentanarhúsinum í Fuglafirði*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Eftir ein stuttan steðg kom so løtan øll høvdu bíðað eftir. Pætur kom fyrst á pallin, har hann sessaðist við klaverið. Hann legði út við at spæla Gakk tú tryggur og sang og spældi síðani Somewhere over the Rainbow. Síðani varð gittarin tikin í hond, og við speisku viðmerkingini »Eg veit ikki, hvar hon blívur av«, byrjaði Pætur at syngja »Mær leingist«. Og ikki gekk long tíð, so gloppaðist hurðin, og Eivør kom berføtt stillisliga og settist við liðina og tók somuleiðis eisini gittaran fram.

### Hugtakandi

Positivu lýsingarorðini vanta ikki, tá ein skal lýsa sangin og spælið hjá Eivør og Pæturi. Tey bæði megnaðu enn einaferð at bergtaka ein fullsettan sal av fólki. Tað tey sungu fevndi um alt. Heilt frá tí jazzkenda yvir í vakrar stillar jólasálmar.

Áhoyrararnir fingu umleið ein tíma av Pæturi og Eivør, sum uttan iva eru heitasta stjørnuparið í Føroyum í hesum døgum. Men lógvabrestirnir vóru so nógvir, at tað slapst ikki undan tveimum eykaløgum.

So ein vælnøgd fjøld trein sunnukvøldið út aftur í kuldan og kavan murrandi »We´ll meet again«, sum var seinasta lagið, tey fingu við sær út á vegnum.




# Tilboðsferðir

frá Atlantic Airways



## Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

**1.479,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald.

Bílegging áðrenn 12/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 15/1 til 22/3 2004.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í mesta lagi burtur í 3 dagar. Fráferð skal verða fríggjadag - heimferðin skal vera sunnudag.



## Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

**1.860,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 20/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 8/1 -29/3 2004.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

## Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

**2.360,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 20/3 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 8/1 - 29/3 2004

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn 2-15). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

**Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.**

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR 355 355


# Endaðu í Breiðá

**Leygarmorgunin koyrdi ein bilur útav uttanfyri Fuglafjørð. Hann endaði í Breiðá**

FERÐSLUÓHAPP

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað var hálka, iðgjørdi, at ein bilur við seks ungdómum leygarmorgunin endaði í Breiðá uttanfyri Fuglafjørð.

Bilurin var á veg úr Fuglafirði, tá førarin misti tamarhaldið á bilinum, sum fór omanav vegnum og endaði í ánni.

Teir seks ungdómarnir, sum við vóru, vóru millum 15 og 19 ár. Tey vóru øll koyrd á sjúkrahúsið, har trý teirra vóru innløgd. Upplýst verður tó av politistøðini í Runavík, at ongin teirra hevði fingið álvarsligt mein, og at tey vóru sera heppin at sleppa uttan størri skaða.

Hvørt tey sótu í trygdarbeltið ella ikki, er ikki greitt enn.

# 16 ára gamal stjól bil

FERÐSLUÓHAPP

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Klaksvík: Ein 16 ára gamal drongur stjól náttina til sunnudagin ein bil og fór koyrdi avstað við honum. Hann og tríggir aðrir dreingir millum 16 og 18 ár vóru í bilinum, sum í einum svingi uppi undir Hálsi í Klaksvík fór útav vegnum. Ongin fekk nakran skaða uttan bilurin sjálvur.



# Jólaaftan á Lágargarði

**Familja hjá búfólkunum og starvsfólkum savnast jólaaftan á hvørjum ári á Lágargarði til at hugna sær saman, og nógv verður gjørt burturúr**

JÓLAHALD

*Myndir: Jan Müller*
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Jólaaftan á Lágargarði. Jólamaðurin kom á vitjan við pakkum, og øll fingu hvør sín*

Børn, abba- og ommubørn, langabba- og langommubørn hjá búfólkunum á Lágargarði savnast hvønn jólaaftan um teirra kæru fyri at halda jól saman við teimum. Hesi eldru fólk kunnu ikki koma heim at halda jólaaftan, so Lágargarður ger á hvørjum ári eitt jólahald sjálvan jólaaftan, soleiðis at familjan kann savnast henda serstaka dag. Henda dag, har fólk flest vilja vera saman við teirra familju.

Jólahaldið byrjar við, at búfólkið etur dunnu um middagsleitið saman við starvsfólkunum. Síðani koma tey avvarðandi á vitjan.

Jólahaldið byrjar vanliga við gudstænastu. Í ár varð gudstænastan við Sonju Klein, presti. Tórshavnar Manskór er somuleiðis við á hvørjum ári, har teir framføra nakrar sangir. Bæði jólaligar og teir av meira vertsliga slagnum. Hetta setur avgjørt sín dám á.

### Nógv fólk

Talið á fólki á Lágargarði til hesar løturnar er blivið størri og størri við árunum, so nú hava tey gjørt av at royna at avmarka talið, tí tey eru við at blíva ov mong. Onkuntíð hava tey verið heili 300 fólk. Talan er jú um familju hjá bæði bú- og starvsfólkum.

Serliga til gudstænastuna, tí at summi enda við at vera so langt burtur frá, at illa ber til at hoyra, hvat ið verður sagt.

– Tvey vaksin verða boðin við til hvørt búfólk, men talið á børnunum er framvegis óavmarkað, sigur Marjun Smith, forkvinna á Lágargarði.

### Jólatræ

Eftir gudstænastuna er so jólatræ fyri børnunum. Tey dansa um jólatræið, og jólamaðurin kemur á vitjan og hevur pakka við til øll. Te og kaffi og smákøkur er til tey vaksnu á runt á deildunum.
Marjun sigur, at tey royna at leggja jólahaldið frá klokkan 13 til 16. Hetta tí at starvsfólkini skulu sjálvsagt heim at halda teirra egna jólaaftan og øll hini eisini. Vanliga eru níggju fólk til arbeiðis á Lágargarði jólaaftan. Trý starvsfólk á hvørji deild.

Tey eta smyrjibreyð saman við búfólkunum og pakka gávur og jólapost upp saman við teimum, um tey avvarðandi ikki hava gjørt tað fyrr um dagin.

So ikki kann annað sigast enn, at tey gera jólaaftan so hugnaligan sum til ber fyri bæði starvsfólk og búfólk við familju á Lágargarði á hvørjum ári.



*Børnini flokkaðust um jólamannin, tá hann býtti gávur út*



*Jólahaldið byrjar við, at búfólkið etur dunnu um middagsleitið saman við starvsfólkunum, áðrenn tey avvarðandi koma á vitjan*



*Ung sum gomul hugnaðu sær jólaaftan á Lágargarði. Lagið var sum vera man gott á øllum*